Billund er veruliga komið á breddan

Ferðamanna-ídnaðurin í Billund hevur ongantíð havt meiri at bjóða uppá enn nú

Á lokalu ferðaskrivstovuni »VisitBillund« eru tey ovurspent. Býurin er nú heimstaður fyri tvey risastór ferðamál fyri barnafamiljurnar. Nevnliga bæði Lalandia og Legoland. Leygardagin 4. apríl letur tað nýggja Legolandið upp, og fram til 29. november verður opið mánadagar til sunnudagar millum klokkan 10 og 18. Prísurin at sleppa inn í tað nýggja Legolandið er 259 krónur fyri vaksin, og 229 krónur fyri børn. Er talan um bólkar, so kostar tað 210 krónur fyri hvønn at sleppa inn.

Sjórænararok

Og sjórænararnir eru veruliga komnir til Legoland. Í Legolandi finst nú »Pirate Lagoon«, sum væntandi fer at fáa metstórar vitjanir. Á teimum leikandi bylgjunum verður eitt blóðreytt sjórænaraskip, sum nevnist »Pirate Wave Breaker«, sum kann fáa sjálvt tann villasta sjórænaran at ýla og flenna. Føroyskar familjur, sum vitja gera best í at minnast

baðiklæðini, tí har kemur at ganga vilt fyri seg, við bæði sjóbardøgum og sjóbrotum. Á økinum vera eisini vatnkanónir og stórir fossar. Tað verður sera spennandi hjá familjuni at taka lut í einum sjórænarabardaga, har tað snýr seg um at raka hini, áðrenn tey raka teg. Allir mans mugu vera til reiðar við kanónirnar á dekkinum. »Pirate Splash Battle« er ein risauppliving hjá bæði børnum, og barnsligum sjórænarasálum. Børnini kunnu eisini gleða seg til ein loftstúr við tí leypandi og ovurfegna »Frog Hopper«, sum er nakað nýtt fyri børnini.

Heimsfrumførsla verður eisini í Legolandi, har til ber at síggja filmin »Bob the Builder«, sum verður vístur í 4D. Tað ber til at uppliva, ella endurupplíva Miniland. Børnini kunnu eisini taka sítt fyrsta koyrikort í ferðsluskúlanum, og til ber at snerkja breyð á pinnum uppi yvir legueldinum, saman við indianarunum. Seint í ár fer Legoland eisini at hava ein spennandi jólamarknað, um ein skuldi verið so heppin at verið í Billund tá.

Ótrúliga vatnlandið

Lalandia letur upp størstu feriu og upplivingarmiðstøð í Billund, stutt frá Legolandi. Í Lalandia verður eisini eitt risastórt vatnland, sum hevur fingið navnið »Lalandia Aquadome«. Har eru nógv vatntiltøk og undirhald fyri alla familjuna. Har ber til at aka á vatnskreiðibreytunum, at svimja tætt við teir tropisku fiskarnar, ella kann ein velja bert at taka sær av løttum í einum av teimum upphitaðu gosbaðunum.

Túrurin við gummibáti gjøgnum risastóru vatnskreiðibreytina »Tornado«, sum er tann fyrsta av sínum slagi í Europa, verður eisini ein uppliving fyri seg.

Møguleikarnir at gista í Billund, bæði í samband við eina vitjan á Lalandia ella eina vitjan í Legolandi, eru munandi øktir. Til ber at biðja sær innivist á gistingarhúsi, á campingplássi, á vallaraheimi, í frítíðarhúsi ella bíleggja eina »Ból og Bita«-gisting.

Á www.visitbillund.dk ber til at lesa um allar hesar møguleikar fyri gisting í Billund, og økinum kring Billund.

Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo